# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg eri vísur í, at tað ber til at fáa frið millum ísraelsmenn og palestinar, men fleiri forðingar eru*
*(Tony Blair)*

# Sum at verða fødd av nýggjum



*Mamma Claru Rojas var komin at taka ímóti dótturini*
*(Mynd: Polfoto)*

**Í fimm ár hava Clara Rojas og Consuelo Gonzalez verið gíslar í Kolumbia. Í gjár sluppu tær aftur til lívið**

- Hetta er sum at verða fødd av nýggjum, segði ein ovurglað Clara Rojas við tíðindafólkini á flogvøllinum í Caracas.Undir liðini á henni stóð Consuelo Gonzalez. Hon var eisini ovurglað. Eitt var, at hon var sloppin frá burturflytarunum, men hon hevði eisini júst fingið at vita, at hon var blivin omma, meðan hon hevði verið gísli.

Venesuelski forsetin, Hugo Chavez, átti ein stóran leiklut í samráðingunum við kolumbisku uppreistrarrørsluna FARC um at fáa tær báðar kvinnurnar leysar, og hann var eisini fegin um úrslitið.

- Eg segði við tær: Vælkomnar aftur til lívið, vælkomnar til lívið, segði Chavez eftir at hava tosað við tær báðar í telefon.

Eygleiðarar siga, at hetta er fyrstu ferð í næstan sjey ár, at FARC hevur játtað at lata gíslar leysar, og Hugo Chavez segði seg vóna, at hetta kann vera byrjanin til, at fleiri gíslar fáa frælsi. Men kolumbisku myndugleikarnir ávara ímóti bjartskygni.

- Vit duga ikki at síggja nakra broyting. Vit vænta ikki, at fleiri gíslar fáa frælsi, og vit hava ongar ætlanir um at tingast við FARC um frið, segði ein kolumbiskur talsmaður.

Consuelo Gonzalez er fyrrverandi politikari, og Clara Rojas arbeiddi saman við politikaranum Betancourt, sum eisini bleiv burturflutt, og sum framvegis er gísli hjá FARC.

# Edmund Hillary deyður

**Sum tann fyrsti kom Edmund Hillary niðan á Mount Everest saman við sherpa-ferðaleiðaranum Tenzing Norgay í 1953**

- Sir Ed lýsti seg sjálvan sum ein meðal nýsælending við avmarkaðum evnum, men í veruleikanum var hann eitt stórmenni, segði nýsælendski forsætisráðharrin, Helen Clark, tá hon hevði fingið deyðsboðini av sínum kenda landsmanni.

Edmund Hillary skipaði fyri fleiri rannsóknarferðum til Suðurpólin og í Himmalaya-fjøllunum, og alt sítt lív virkaði hann fyri at hjálpa fjallafólkinum í Nepal. Hann stovnaði ein serligan grunn, sum hevur latið pening til at byggja skúlar, sjúkrahús og brýr, og ofta var hann sjálvur uppi í arbeiðinum.

Tað var eisini á einari ferð í Nepal í apríl í fjør, at Edmund Hillary bleiv sjúkur, og í gjár doyði hann. Hann var 88 ára gamal.



*Tenzing Norgay og Edmund Hillary vórðu stórliga fagnaðir, tá teir sum teir fyrstu komu niðan á toppin á Mount Everest í 1953*

# McCain á odda í South Carolina



*John McCain kann taka eitt týðandi stig í næstu viku*

Tann 71 ára gamli senatorurin hevur bestu møguleikarnar at vinna hjá republikanarunum í South Carolina

Í næstu viku verður uppstillingarval í amerikanska statinum South Carolina, og eygleiðarar siga, at úrslitið hjá republikanarunum er serliga áhugavert, tí tað kann geva eina ábending um, hvønn teir fara at stilla upp á forsetavalinum í novembur.

Ein meiningakanning, sum sjónvarpið Fox hevur gjørt, vísir, at John Mc Cain liggur nógv best fyri í South Carolina. Hann fær sambært kanningini 25 prosent av atkvøðunum, meðan Mike Huckabee og Mitt Romney fáa ávikavist 18 og 17 prosent.

Tann 71 ára gamli Mc Cain vann valið í New Hampshire týsdagin, eftir at Mike Huckabee hevði vunnið í Iowa. Vinnur McCain í South Carolina, stendur hann sterkur, siga eygleiðarar.

## STUTT SAGT

### Kerry stuðlar Obama

John Kerry, sum tapti amerikanska forsetavalið fyri fýra árum síðani, sigur nú, at hann stuðlar floksfelagan Barrack Obama og hansara roynd at gerast forsetavalevni hjá demokratunum. John Kerry, sum situr í Umboðsmannatinginum, sigur, at Obama er tann, sum er best egnaður at sameina amerikanska fólkið, og at hann eisini er best egnaður at fremja grundleggjandi broytingar í amerikanska samfelagnum.

### Skipsvanlukka

Tveir menn doyðu, og ein fekk stóran skaða í einari vanlukku umborð á einum bingjuskipi í Eystrasalti í gjár. Vanlukkan hendi umborð á skipinum MSC India, sum er skrásett í Panama, tá skipið var statt sunnan fyri svenska býin Karlskrona. Sambært svensku bjargingartænastuni vóru tveir av monnunum úr India og tann triði úr Pakistan. Sum skilst vóru teir tríggir menninir í einum bjargingarbáti, sum brádliga loysnaði og datt niður á sjógvin. Menninir vórðu alt fyri eitt fluttir á sjúkrahúsið í Karlskrona. Tað vísti seg, at ein teirra var deyður, tá hann kom hagar, og ein doyði løtu seinni.

### Ferðafólk í karantenu

75 fólk, sum komu við einum flogfari úr Tel Aviv í Ísrael til Toronto í Kanada í gár, vórðu alt fyri eitt sett í karantenu, tí tað vísti seg, at øll høvdu fingið magasjúku við somu sjúkraeyðkennum. Átta av ferðafólkunum høvdu fingið trupulleikar á ferðini, og tí stóðu sjúkrabilar og læknar á flogvøllinum, tá flogfarið setti seg. Aftan á læknakanningar sluppu 47 fólk av flogvøllinum, men hini 28 vórðu beind í karantenuhøli til kanningar.